# Kili eitur Chile

- Vit vilja hava eina klárheit og einsrættaða linju, hvussu mann skrivar, staðarnøvn á føroyskum, sigur Rolf Guttesen, sum er millum teirra, sum skipa fyri kjakfundi í Miðlahúsinum um hvussu staðanøvn í øðrum londum skulu skrivast í føroyskum tekstum. Rolf Guttesen tekur millum annað dømið fram, at Kili ikki skal skrivast soleiðis, men Chile, tí vanlig mannagongd í flest øðrum londum er, at nøvn verða skrivaði, soleiðis, sum fólkini í landinum siga tað. Fundurin verður í Miðlahúsinum í morgin klokkan 15, og tað eru Rolf Guttesen, Eyvind Weyhe, Sjúrður Skaale og André Niclasen tosa um hesi viðurskifti. Aftaná verður kjak.



# Manslega í Nesvík

Í døgunum 27. til 29. november verður manslega í Nesvík. Nógv er á skránni, bæði av andaligum og sosialum tiltøkum. Tey vænta, at húsið verður fult og siga, at tilmeldingarlistin boðar frá góðum. Tveir fyrilestrar eru á skránni, sum ávíkavist Bergur D. Joensen, sóknarprestur og Øssur Kjølbro, aðalskrivari fara at hava. Eitt serlig sangkvøld verður eisini, har allir menn fara at syngja felagssang. Festkvøld við serliga góðum mati, skemti og øðrum verður leygarkvøldið. Freistin fyri at melda seg til leguna er fríggjadagin 20. november. Allir menn eru vælkomnir. Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni hjá kirkjuligu Heimamissiónini www.mission.fo



*Føroyski fiskiskipaflotin – bæði á nær og fjarleiðum – koyrur við halli. Samanlagt hava allir skipabólkar hall, og ivasamt er, um gongdin í ár verður nakað betri*

*Mynd: Karstin Vang*

er kortini nøkulunda konsolideraður, men gjaldførið kundi verið betri.

- Sambært tølum hjá FF er miðalprísurin hjá pelagiskum skipum hækkaður nakað fyrstu 9 mánaðirnar í ár, men samlaða veiðan og samlaða veiðivirði er tó minkað í sama tíðarskeiði.

Bjarni og Jacobina vísa á, at nú færri skip eru í hesum bólki, og veiðimøguleikarnir eru broyttir, er tað torført at samanbera árið 2009 við 2008.

Rækjuflotin hevur havt nógv trupul ár á rað, og støðan var framvegis vánalig við árslok 2008.

- Í løtuni eru bert 3 skip í rækjuvinnuni, og sambært tølum hjá FF er miðalprísurin fyri kilo 9 teir fyrstu mánaðirnar í 2009 hækkaður í mun til somu tíð í fjør. Hinvegin er nøgdin minkað nakað. Samanlagt er veiðivirðið hækkað í ár, og samanlagt eru útlit til, at gongdin hjá rækjuskipunum hevur verið nakað betri í ár enn í fjør. Ein týðandi partur er, at oljuprísirnir eru væl lægri enn í 2008.

Verksmiðjutrolararnir hava havt nøkur rímiliga góð ár, og flotin er rímiliga væl fyri við árslok 2008. Raksturin hevur verið stabilt góður árini 2004-2007, men úrslitið var vánaligt í 2008. Bæði prísir og veiðinøgd vóru vánalig í 2008.

- Sambært tølum, vit hava fingið, minkar veiðinøgdin í 2009, samstundis sum miðalprísurin fyri vøruna eisini minkar í ár. Væntandi er, at úrslitið hjá hesum bólki verður umleið tað sama í ár sum í fjør.

Um partrolaraflotan siga tey bæði, at gongdin hjá hesum partinum av flotanum versnaði munandi í 2008, og bæði solvensur og gjaldføri vóru vánalig við árslok í fjør.

- Veiðinøgdin fyrstu 9 mánaðirnar í ár er nakað tann sama sum somu mánaðir í fjør, men kanningin vísir, at miðalprísurin er øktur fyrstu 9 mánaðirnar í ár. Við lækkandi oljuprísum í mun til í fjør, er væntandi, at vánaliga úrslitið hjá partrolarum kanska ikki verður uppaftur verri í ár enn í fjør.

Hjá lemmatrolarum stendur sum heild einki serligt til, og fíggjarstøðan er ikki nøktandi. Gjaldførið versnaði nógv í 2007 og 2008, eins og minking í veiðinøgd og miðalprísi árini 2006-2008 merkir, at úrslitið hjá hesum skipum aftur vendist til hall.

- Sambært tølum hjá FF hava lemmatrolarar merkt eina afturgongd í veiðinøgd higartil í ár, eins og miðalprísurin er lækkaður nakað. Tó at oljan er bíligari í ár enn í fjør, er væntandi, at úrslitið hjá lemmatrolarum verður uppaftur verri í ár enn í fjør.

Línuskip hava havt nøkur vánalig ár. Miðalprísurin fyri veiðina hækkaði í 2005, 2006 og 2007, men minkaði aftur munandi í 2008.

- Vegna fallandi veiðinøgd og í seinastuni eisini við minkandi fiskaprísum hava hesi skip havt stóra afturgongd seinastu 5 árini. Serliga stór hevur afturgongdin verið í 2007 og 2008.

Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum vísa eisini í hesum førinum til tøl hjá Fiskimannafelagnum fyri árið í ár.

- Her sæst ein afturgongd í veiðinøgd fyrstu 9 mánaðirnar í ár, eins og miðalprísurin er lækkaður munandi. Hetta merkir, at samlaða veiðivirðið hjá línuskipum er tískil munandi lægri í ár enn somu tíð í fjør. Væntandi er tí, at ársúrslitið hjá línuskipum verður uppaftur lakari í ár enn í fjør, sum annars var eitt sera vánaligt ár.

Tey bæði vænta, at tað verða línuskip, sum ikki megna at halda fram, sum tíðin gongur.